Bergsli›i› skriva›i seg í søguna

Familjan hjá Ey›ger› og Bergi Petersen og ÍF meistarali›i› frá 1979 syrgdu vi› minnisríkum fótbóltsdysti fyri einari ógloymandi løtu, sum samstundis hev›i vi› sær, at ta› fløddi heilt fitt í kassanum hjá ÍF

Ta› er ikki á hvørjum degi, at ta› er ein sovor›in fótbóltsdystur sum tann, i› fuglfir›ingar og nógv onnur vóru vitni til seinnapartin leygardagin. Tey seinnu árini hevur ta› veri› sjón fyri søgn, at teir stevnudystirnir – og her er ólavsøkufótbólturin rokna›ur uppí – sum ikki eru landskappingardystir, hava havt lítlan og stø›ugt minkandi áhuga millum fólk.

Um stevnufólki› skal savnast um fótbóltin, so skal okkurt serstakt og áhugavert vera á skránni. Ta› hevur veri› roynt at raka seymin á høvdi› á ymsan hátt. Fremmand li› hava vitja›, einstakir úrmælingar hava styrkt føroysk li›, og solei›is kundu vit hildi› á.

Men onganttí› hevur talan veri› um eitt sovor›i› plettskot, sum ta› var, tá ÍF li›i›, sum í 1979 vann meistaraskapin, og teir ellivu synirnir hjá Ey›ger› og Bergi Petersen í Fuglafir›i, leygardagin stó›u fyri fótbóltsbor›rei›ingini á varmakeldustevnuni.

Tann stóra Petersen familjan avmynda› aftaná dystin leygardagin. Sjálvt um teir taptu 4-3 var h‡rurin sera gó›ur

Umlei› 600 ásko›arar rinda›u hálvt hundra› krónur í part fyri at síggja dystin, sum fyri ásko›ararnar gjørdist naka› heilt serligt. Fótbóltsundirhaldi› var sjálvsagt ikki á sama stø›i, sum ta›, i› hevur veri› at sæ› í sjónvarpinum tær seinastu vikurnar. Men ta› man mangan vera komi› fyri, at stø›i› ikki hevur nátt tí, sum ta› var leygardagin.



Bergur st‡rdi spælinum av sí›ulinjuni

Hóast teir eru farnir um tey fjøruti., so duga teir, sum í 1979 saman vi› svianum Ronny Gunnarsson vunnu fyrsta og higartil einasta FM heiti› til Fuglafir›ar, framvegis at spæla bólt. Kristian Petersen, Kaj Eli Olsen, Meinhardt Dalbú›, Abraham Hansen, Sonni Jensen, Jan Nielsen og allir hinir, sum vóru so óførir fyri meiri enn tjúgu árum sí›ani, vita framvegis, hvat ta› sn‡r seg um. Og í málinum stó› Steinbjørn í Lambanum, sum vi› fleiri stórbjargingum gav ábendingar um, at hann framvegis kundi havt veri› evni til besta li›i›.

Veteranarnir vunnu 4–3. Í ste›ginum stó› á jøvnum 1–1, og eina løtu í 2. hálvleiki sá einki út hjá Bergsli›num, sum beiggjarnir kalla›u seg. Jan Nielsen var rættuliga í hopla, hann skora›i øll málini fyri FM li›i›, og tá teir vóru komnir framum 4–1 bendi okkurt á stórsigur. Men so tóku beiggjarnir dyk á seg og minka›u um munin til 4–3.

Talan var á ongan hátt um avtala› spæl. Men tá FM 79 hev›i fingi› handa› steypi›, bo›a›i Sonni Jensen, sum saman vi› málverjanum, Steinbjørn í Lambanum, er drívmegin í fótbóltsdeildini hjá ÍF, frá, at teirra li› var longu undan dystinum samt um, at uttan mun til hvussu ta› fór at tørna út, so skuldi Bergsli›i› fáa steypi›. Og nú hevur vakra steypi›, sum pf. Haraldsen hev›i givi›, fingi› hei›urspláss í stovuni á Kambsdali!

Fyrstu fer› í tólv ár

Tá familjan kom út á Kambsdal ella Ytra dal, sum fuglfir›ingar siga, vi› steypinum, var hetta fyrstu fer› í tólv ár, at øll familjan var savna›. Fyrstu børnini giftust út í 1988, og sí›ani tá hevur ta› onganttí› bori› solei›is á, at øll hava veri› heima í senn. Familjan var savna› leygardagin og sunnudagin, og tey vóru umlei› tríati til døgur›a.

Í sí›stu viku vóru beiggjarnir fleiri fer›ir á vøllinum í Fuglafir›i og vandu, og tá Ey›ger› og Bergur og døtrarnar bá›ar seinnapartin leygardagin so at siga gjørdust mi›depul í hesum óføra bygdartiltakinum, dugdu tey so væl at spæla sín leiklut, at tey væl kundu havt vant heilt leingi. Pápin var serliga aktivur á sí›ulinjuni, tá ta› eina løtu í 2. hálvleiki ikki sá naka› serligt út. Og tá Bergsli›i› skora›i málini, runnu allir ellivu brø›urnir út á sí›ulinjuna til mammuna og systrarnar at fagnast saman vi› teimum.

Gomul hugsan

Ey›un Petersen, næstelsti beiggin og málverji leygardagin, var talsma›ur hjá Bergsli›num:

– Vit hava leingi spælt vi› tankan um, at ta› hev›i veri› stuttligt at roynt okkum í onkrum lokalum tiltaki. Tá ta› var greitt, at Martin, sum b‡r í Namibia, fór at vera heima á varmakeldu í summar, so bo›a›u vit ÍF frá, at vit vóru til dystin fúsir. Hetta var í apríl mána›i. Sonni Jensen, forma›ur í fótbóltsnevndini, hevur samskift vi› okkum, og vit hava veri› ógvuliga spentir.

Og Sonni Jensen sigur:

– Eg helt hugsanina um ein sovornan dyst vera áhugaverda, men at ta› fóru at vera pengar í hasum, dugdi eg ikki at ímynda mær beinanvegin. Men ta› kendist skjótt, at áhugin var stórur, og vit fara onganttí› at gloyma varmakelduna ár 2000. Ve›ri› var fínt, og ta› var stuttligt at spæla, sjálvt um ta› var heilt t‡›uligt, at ásko›ararnir tóku á vi› beiggjunum, og at vit fyri fyrstu fer› so at siga vóru á útivølli í Fuglafir›i.

´79-li›i› vísti, at teir framvegis kunnu , sjálvt um nakrir teirra eru komnir uppí árini

Nógvir stu›lar

Dagur og vika gjørdi nú eitt kvøldi› eitt líti› sindur burturúr, at dysturin skuldi ver›a. Heima vi› hús høvdu serliga teir yngru brø›urnir tosa› um, hvussu ta› fór at ver›a vi› búnum, me›an eldru brø›urnir ikki hildu hetta hava so stóran t‡dning. Mamman hev›i – sum mammum líkt – fata›, hvussu nógv hetta hev›i at t‡›a fyri teir yngru, og so n‡tti Ey›ger›, mamman at fótbóltsli›num!, høvi› at siga í sjónvarpinum, at ta› hev›i komi› væl vi›, um onkur hev›i stu›la› tiltakinum.

– Ta› gekk bara ein lítil løta, so høvdu fleiri givi› til kennar, at tey vóru áhuga› at stu›la. Formula Xerox og Bo›asteinur rinda›u fyri búnarnar, og Haraldsen og KJ Hydraulic góvu venjingarbúnarnar. Bæ›i teimum og hinum, sum veittu stu›ul, eru vit ómetaliga takksom, sigur Ey›un Petersen. Hinir stu›larnir vóru Faroedane, JT Electrics, Føroya Betongsaging, Danstein og Fuglø Arkitektar.

Brø›urnir og familjan settu rættuliga dám á varmakeldustevnuna. Teir vóru vi› í skrú›gonguni, tá stevnan var› settt av Dánjáli Vang, b‡rá›slimi. Familjan var rættuliga sjónsk. Á bringuni á spælarablusunum var prenta› 38 ára gamla brú›arbílæti› av foreldrunum. Hugskoti› áttu Hildigar› Eliasen og Malan Jacobsen. Malan, sum er systir Ey›ger›, "sníkti" seg at "læna" bílæti› til endamáli›.

– Vit kendu, at leygardagurin var hugnaligur fyri øll tey, sum vóru til dystin. Fyri okkum fer tiltaki› altí› at vera minnisríkt. Bæ›i leygardagurin og ikki minst fyrireikingarnar. Ta› hevur veri› naka› heilt serligt í familjuni í vikunum og døgunum uppundir varmakelduna, sigur Ey›un Petersen. Hann og fleiri av hinum í eldra endanum hava ikki spælt skipa›an fótbólt, sí›ani teir vóru dreingir ella unglingar. Teir yngru spæla í ÍF, og onkur av teimum, sum er fluttur av landinum, hevur spælt á besta li›num. Felags fyri teir allar var, at teir høvdu evni at spæla bólt, og fyri ásko›ararnar fer varmakeldudysturin ár 2000 altí› at standa í huganum sum naka› heilt serligt.

Hetta var fyrsta og ivaleyst einasta fer›in, at synir hjá einari mammu og einum pápa manna›u eitt fótbóltsli› í Føroyum. Hugflogi› skal n‡tast at fáa stevnufótbóltin at ver›a áhugaverdan. Men av sjálvsøgdum orsøkum ber ta› illa ella ikki til at fáa sovornar dystir í hvørjari øld, sum tann, i› var í Fuglafir›i leygardagin.

jh

Bergsli›i›

Frø›in var stór, tá i› teir skora›u

Tey hava liva› saman í hjúnarlagi sí›ani 1962. Ey›ger›, sum er ætta› úr Nor›ragøtu, og Bergur Petersen bygdu í Fuglafir›i, og tey eiga trettan børn á lívi. Ein drong mistu tey, tá hann var átta ára gamal.

Í juni í 1984 brendu húsini vi› Gjógvará. Tá fluttu tey ni›an í húsini hjá foreldrunum hjá Bergi. Har bú›u tey inntil í 1987. Silvurbrúdleypsdagin, i› var 11. februar 1987, fluttu tey í n‡ggju húsini á Kambsdali, sum tey – vi› gó›um stu›li frá fólki nærri og longri burturi frá, sum næstelsti sonur in tekur til – høvdu lati› bygt.

Martin 19.07.62. Skipsførari, b‡r í Walvis Bay í Namibia á áttanda ári, førir feskfiskatrolara, sum hoyrir heima í Namibia. Kona Martin er Verna, børnini Amanda og Jonberg.

Ey›un 26.09.63. Byggifrø›ingur, b‡r í Søldarfir›i. Kona Ey›un er Vígdis, børnini Ey›bjørg, Marin og Eva.

Sonja 18.05.64. Skrivstovukvinna, b‡r í Tórshavn. Ma›ur Sonju er Jónfinn, sonurin Andru Emil.

John 01.10.66 . Grannsko›ari, b‡r í Keypmannahavn. Kona John er Jónger›, børnini Dávidd, Rebekka og Sara.

Finnur 26.01.68. Byggifrødingur, b‡r í Tórshavn.

Frí›a 15.05.70. Lesur ergoterapi í Esbjerg. Ma›ur Frí›u er Petur, børnini Harald og Bergur.

Árni Jóhan 06.01.72. Doy›i 8 ára gamal.

Fró›i 19.10.73. N‡útbúgvin maskinmeistari frá Odense.

Sámal Petur 25.05.75. Lesur til lærara í Havnini.

Birgir 27.09.77. Elektrikari b‡r á Kambsdali.

Rúni 08.08.79. Gongur í HF og b‡r á Kambsdali.

Árni Jóhan 21.12.81. Krambakallur, b‡r á Kambsdali.

Henri 23.09.83. 10. floks næmingur, b‡r á Kambsdali

Atli 21.05.85. Yngsti sonuruin gongur í Fuglafjar›ar Skúla, b‡r á Kambsdali.